# JT Electric many exciting solutions for the fishing- and aquaculture industry

**TrawlCam system is just one of several, which JT electric has developed. The system uses live pictures to show how trawl gear functions. It is possible to monitor exactly how the trawl and trawl-doors are performing, also the behaviour of the fish. Armed with this knowledge, it becomes much easier to decide what action to take to improve the catch -"In other words, our system transports reality from the seafloor to the bridge", says Mr Sofus Gregersen, Sales and Marketing Manager at JT electric**



The company JT electric from Kambsdal, has an exhibition stand at "Fish Expo Faroes 2009".

The company has a variety of goods and solutions in their product range, but at the exhibition, they are in particular focusing upon:

1. The new trawl camera (TrawlCam)
2. Lighting for smolt stations and fishfarms (Oceanlite)
3. A newly developed multi-controlling system for the fishfarming industry (Control All)

Mr Gregersen, the Sales and Marketing Manager says these are all systems, which JT electric has designed and developed in cooperation with the relevant industry. The equipment is also produced by JT electric.



*One of the newest items JT electric has in the product range is a camera system for the trawling industry, called TrawlCam*

## TrawlCam

-"One of the newest items in our products range, is a camera system named TrawlCam. This is a system we have developed through cooperation with skippers, in particular Mr Bjarni Petersen, the skipper onboard the shrimp trawler Artic Viking and the trawl producer Vónina. This is a system we have been working on for a number of years. During this trial period, we have experimented and closely monitored what requirements the fisherman requires.

Mr Gregersen says the TrawlCam system was marketed for the first time in January 2008, and since then the level of interest for the system has been quite high, not least abroad.

-"We have sold approximately 80 – 90% abroad. Among our clients is a large shipping company in Seattle in the USA, which has bought several TrawlCam systems for their vessels.

He points out that the camera system is being used onboard both pelagic vessels, operating a floating trawl and for bottom trawlers.

-"In Seattle, the fishermen are very satisfied with this Faroe system and we have been getting the same feedback from other places where it has been sold. Our system covers a universal requirement, wherever there is a trawling industry", says Mr Gregersen.



*Sofus Gregersen is the Sales and Marketing Manager at JT electric. He is expecting many inquiries from Norway regarding their new energy saving aquaculture lights, which the company has developed*

The TrawlCam system delivers live high-quality pictures and shows exactly how the gear is functioning. It is possible to monitor how the trawl and trawl-doors are performing, and the fish behaviour. Thereby it becomes much easier to decide what action to take to improve the catch. In other words, you can "transport" reality from the seafloor to the bridge.

-"Of course sailors know in general terms how a trawl functions, but with this system you can see this for yourself, making it possible to implement changes if deemed necessary.

Mr Gregersen says that a system like TrawlCam is a "must" onboard every trawler.

-"There is also an interest for the system in the Faroes, and some system have been sold to Faroe vessels, but the current economic situation of the fishing fleet may be an obstacle for the home fleet".

The Sales and Marketing Manager points out that it is new for the fishing fleet to have a camera onboard, which actually shows how the gear is performing.

-"Trawlers have for several years had various sensors, which would depict the condition off- and in the trawl, but having a camera in the trawl is new".

Mr Gregersen says that outside of the Faroes, it is particularly shipping companies from the USA, Norway, Ireland, Greenland and Denmark, which have bought the TrawlCam equipment.

-"In the oil industry underwater cameras are not unknown, but these are many times more expensive compared to those in our product range. We supply a quality product at an acceptable price for the requirements of the fishing industry", he says.

## Underwater lighting

JT electric has for several years produced underwater lighting – Oceanlite – for the aquaculture industry. The objective of this lighting is to delay the spawning process and increase the growth of the fish.

Faroe salmon and trout farmers have applied these lights for several years, and the company from Kambsdal has been almost the sole supplier to the Faroe market. The fishfarming lights are produced in a range

# JT electric nógvar spennandi loysnir til fiski-og alivinnu

**TrawlCam-skipanin er bert ein av fleiri, sum JT electric hevur ment. Henda skipan vísir við livandi myndum, hvussu trolreiðskapur virkar. Fylgjast kann við, hvussu trol og lemmar ganga, hvussu atferðin hjá fiskinum er. Á henda hátt gerst munandi lættari at taka avgerðir um, hvat kann gerast fyri at betra um veiðina. – Okkara skipan flytir við øðrum orðum veruleikan úr dýpinum og upp á brúnna, sigur Sofus Gregersen, sølu-og marknaðarleiðari hjá JT electric**



Fyritøkan JT electric á Kambsdali hevur framsýningarbás á Fish Expo Faroes 2009.

Fyritøkan hevur nógvar ymiskar vørur og loysnir í sínum útboði, men fer á framsýningini serliga at leggja dent á 1) nýggja trolmyndatólið (TrawlCam), 2) ljós til smoltstøðir og alibrúk (Oceanlite) og 3) eina nýggja multistýriskipan til alivinnuna (Control All).

Sofus Gregersen, sølu-og marknaðarleiðari, sigur, at hetta eru alt skipanir, sum JT electric hevur ment í samstarvi við avvarðandi vinnu. Útgerðin verður eisini framleidd hjá JT electric.

## TrawlCam

- Eitt tað nýggjasta vit hava í okkara vøruútboði, er ein kameraskipan, nevnd TrawlCam. Hetta er ein skipan, sum vit hava ment í samstarvi við fiskiskiparar, serstakliga Bjarna Petersen, skipara á rækjutrolaranum Arctic Viking og trolvirkið Vónina. Hetta er ein skipan, ið vit hava arbeitt við og gjørt royndir við í nøkur ár, og í hesum tíðarskeiði hava vit neyvt fylgt við og kannað eftir, hvør tørvurin hjá fiskimonnum er.

Sofus Gregersen sigur, TrawlCam-skipanin varð slept út á marknaðin í januar mánaði í 2008, og síðan tá hevur áhugin fyri henni verið rættiliga stórur, ikki minst í útlandinum.

- Vit hava havt eini 80-90% av søluni á útlendska marknaðinum, og millum keyparanar er eitt stórt reiðarí í Seattle í USA, sum hevur keypt fleiri slíkar trolkamera-skipanir til síni skip.

Hann vísir á, at kameraskipanin bæði verður keypt til pelagisk skip, ið fiska við flótitroli og til skip, sum fiska við botntroli.

- Í Seattle eru fiskimenn sera væl nøgdir við føroysku skipanina, og vit hava fingið somu afturljóð aðrastaðni, har hon er seld. Við okkara skipan kunnu vit dekka ein tørv, sum er allastaðni kring heimin, har trolvinna er, leggur Sofus Gregersen aftrat.

TrawlCam-skipanin vísir við livandi hádygd myndum, hvussu reiðskapurin virkar. Fylgjast kann við, hvussu trol og lemmar ganga, hvussu atferðin hjá fiskinum er, og soleiðis gerst tað munandi lættari at taka avgerðir um, hvat kann gerast fyri at fáa fiskiskapin at verða betri. Tú kanst við øðrum orðum "flyta" veruleikan úr dýpinum og upp á brúnna.

- Sjálvandi vita menn í tí stóra og heila, hvussu reiðskapur gongur, men við hesi skipan sært tú hetta við egnum eygum, og tá ber eisini til at fremja batar, um hildið verður, at tað er neyðugt.

Sofus sigur, at ein slík skipan sum TrawlCam er eitt "must", umborð á hvørjum trolara.

- Áhugi er eisini fyri skipanini í Føroyum, og nakrar skipanir eru seldar føroyskum skipum, men kanska eru tað fíggjarligu viðurskiftini hjá fiskiflotanum, ið gera, at heimamarknaðurin líka sum hevur verið eitt sindur afturhaldin.

Sølu-og marknaðarleiðarin vísir á, at tað er nýtt hjá fiskiflotanum at hava kamera sum vísir, hvussu reiðskapurin gongur.

- Trolarar hava í fleiri ár havt ymiskar sensorar sum siga, hvussu viðurskifti eru við og í trolinum, men vanligt hevur ikki verið við myndatóli í troli.

Sofus sigur, at uttanfyri Føroyar er tað serliga í USA, Noregi, Írlandi, Grønlandi og Danmark, at reiðaríir hava keypt sær TrawlCam-útgerðina.

- Í oljuvinnuni eru undirvatnskamera ikki ókend, men hesi eru nógvar ferðir dýrari enn tey, sum vit hava í okkara útboði. Vit hava eina dygdargóða vøru í einum hóskandi prísi til tørvin hjá fiskiskipavinnuni, sigur hann.

## Undirvatnsljós

JT electric hevur í fleiri ár framleitt undirvatnsljós –